

*Nakrar fáar minuttir yvir átta var uppteljingin liðug. Hjørleif Gaard, formaður í valstýrinum, taldir tær 121 atkvøðurnar og legði 69 í Runavíkabunkan og 52 í Fuglafjarðabunkan.*

*Mynd: Maria Olsen*

# Vegurin gongur til Runavíkar

**Áhugin at vera við í framtíðini hjá Oyndarfjarða Kommunu var ovurstórur. 121 av 136 vóru við í fólkaatkvøðuni. 69 valdu Runavík og 52 Fuglafjørð.**

FELAGSKOMMUNA
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Borgarstjórin í Oyndarfirði var á fólkaatkvøðu, men vil framvegis ikki siga, um hansara atkvøða var fyri at leggja saman við Runavík ella Fuglafirði.

- Nú hevur fólkaræði víst at tað riggar. Her var ein greiður marginalur. Tað eri eg glaður fyri, sigur Árni Joensen, sum ikki á nakran hátt vil avdúka, hvat hann sjálvur stendur.

At oyndfirðingar vildu vera við at avgera, hvønn kommunan í framtíðini skal vera saman, vístu luttøkan á fólkaatkvøðuni.

136 fólk í kommununi høvdu atkvøðurætt og 121 atkvøddu. 11 av teimum, sum vóru burturstødd høvdu gjørt sær ómak at brævatkvøða. Sjálvt um ein greiður meiriluti var fyri at velja Runavík, so sita í hvussu so er 52 oyndfirðingar eftir sum taparar. Tey 52, sum vildu vera saman við Fuglafirði.

### Fomlig viðurskfiti

Fyri borgarstjóran er úrslitið av fólkaatkvøðuni ein lætti.

- Vit høvdu øll roknað við, at tað fór at vera javnt. Bæði seinasta týsdag, tá vit atkvødu um samanlegging í heila tikið og nú, tá vit skuldu velja eina kommunu, men tað er ein lætti fyri meg, at úrslitið var so greitt.

Seinastu dagarnar upp undir var valstrð í bygdini, men borgarstjórin heldur ikki, at seinastu tímarnir fluttu nógvar atkvøður. Fólk valdu við hjartanum.

Samaleggingin við Runavík verður gjørd eftir sama leisti, sum samanleggingin millum Skála og Runavík. Bygdaráðið i Oyndarfirði skal nú formliga staðfesta, at Oyndarfjarða Kommuna verður strikað av føroyakortinum.

Bygdaráðið kundi sjálvt tikð avgerðina, men valdi at spyrja bygdafólkið og nú verður tann avgerðin so fylgd.

Enn er meiri enn eitt ár til kommunurnar formliga leggja saman, men nógv fyrireikingararbeiði er at gera.

- Nú ræður um hjá okkum, at fáa alt hetta at ganga so lagaligt sum gjørligt, sigur Árni Joensen.

# Eri djúpt, djúpt skuffaður

**Í Fuglafirði situr borgarstjórin eftir sum taparin. Hann hevði ætlað, at gamla sambandið, sum hevur verið millum Oyndarfjørð og Fuglafjørð fór at endurnýggjast á fólkaatkvøðuni í Oyndarfiðri týsdagin.**

FELAGSKOMMUNA
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

- Jú, eg má siga, at eg eri ógvuliga skuffaður. Á middegi týsdagin hildu vit, at Oyndarfjørður atkvøddi seg henda veg, men tað tykist, sum allar óvissu atkvøðurnar eru farnar hinvegin.

Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafirði, kann bara staðfesta, at fólkið hevur talað og fólkið valdi ikki Fuglafjørð.

Og tosið um tunnil millum Hellurnar og Fuglafjørð tagnar eisini eftir úrsltið í Oyndarfirði.

- Vit hava fingið greið boð úr Oyndarfirði, Tey vilja sleppa at koyra uppum fjallið, sigur ein ørkimlaður borgarstjóri.

- Skulju vit nú fara buldrandi gjøgnum fjallið til Oyndarfjarðar og so vita, at vit ikki eruj vælkomin, spyr Sigurð Simonsen og staðfestir, at oyndfirðingar hava sagt, at tey ikki vilja lyfta tað arbeiðið saman við Fuglafjarða Kommunu, sum krevst fyri at fáa ein tunnil.

- Støðan er so tann, at nú vera tað vit sum avgera nær og hvussu ein tunnil skal gerast. Hann kemur fyrr ella seinni, men sjálvandi verður hann lagdur eitt sindur afturum eftir hetta.

### Ringbindini til Runavíkar

Oyndarfjørður og Fuglafjørður hava arbeitt saman um bókhaldið hjá Oyndarfjarða Kommunu, men hetta er nú liðugt og eitt sindur av beiskleika hómast í røddini á borgarstjóranum.

- Vit hava havt alt bókhaldið hjá Oyndarfjarða Kommunu, men nú skulu ringbindini koyrast til Runavíkar. Vit hava heldur ikki tikið nakað serligt gjald fyri tað arbeiðið. Og tey, sum hava arbeitt við bókhaldinum her á skrivstovuni, eru sjálvandi eisini kedd.

- Vit hava eisini givið teimum ein brandvil ókeypis, nú veit eg ikki, hvussu verður við honum, sigur Sigurd Simonsen, borgarstjóri í Fuglafjarða Kommunu.



# Eg eri fegin um greiða úrslitið



*Kári P. Højgaard, løgtingslimur fyri sjálvstýrisflokkin, ynskir Rodmundi Nielsen, borgarstjóra í Runavík, tillukku við nýggju kommununi. Eftir uppteljingina var Rodmund Nielsen skjótur til Oyndarfjarðar at vísa seg fyri bygdafólkinum.*

*Mynd: Maria Olsen*

**Rodmund Nielsen, komandi borgarstjori í Oyndarfirði, var ein túr í nýggju bygdini í kommununi í gjárkvøldið**

FELAGSKOMMUNA
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

- Eg hevði ikki varðhugan av, hvat úrslitið fór at vera, men eri fegin um, at valið hjá oyndfirðingum var so greitt. Satt at siga, hevði eg væntað eitt javnari úrslit.

Hetta eru fyrstu orðini hjá Rodmundi Nielsen, sum í dag er borgarstjóri í Runavík og sum lættliga kann gerast borgarstjóri fyri samanløgdu kommununi, har bæði Skála og Oyndarfjørður verða uppií.

Í Runavík hava tey royndir við samanlegging av kommunum. Skála hevur atkvøtt um at leggja saman við Runavík og nú kom Oyndarfjørður afturat.

- Enn er langt á mál, tí Eysturoyggin skal niður á nógv færri kommunur, men hetta er byrjanin. Klára vit at gera samanleggingingar sjálvbodnar er tað betur, sigur Rodmund Nielsen.

Enn er Sjóvar Kommuna ikki partur av Skálafjørðskommununi, men lítið er at ivast í at har verður eisini hugsað í hesum døgum. Nes Kommuna liggur eisini við fjørðin og nú eru meiri enn 30 ár síðani Runavík og Nes slitu komunusambandið.

- Ein størri samanlegging verður helst aktuel um nøkur ár. Vit samstarva í løtuni upp á kryss og tvers. Alt er meiri ella minni samanvaksið kring fjørðin, sigur Rodmund Nielsen.

Í løtuni er framhaldsdeildin hjá oyndirðingum á Strondum og ongar ætlanir eru um at broyta tað. Í hvussu so er ikki, at tøma vestara arm á fjørðinumk fyri skúlar.

# Botngraving í Trongisvági meldað til politiið

**Heilsufrøðiliga Starvstovan vil hava fútan at kanna, um Landsverkfrøðinguri n ella byggifelagið Articon hava brotið lógin, tá uppgrevstur av botninum var sokkin aftur longri úti á firðinum**

AFTURSØKKING
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð skal Heilsufrøðiliga Starvsstovan viðgera eina umsókn um, at loyva at aftursøkkja móru og annað tilfar, sum verður grivið upp av botni.

Arbeiðið at dýpa økið við nýggju samferðsluhavnina á Trongisvági var steðgað fríggjadagin, tí loyvini at aftusøkkja tilfarið, sum var grivið upp á av botni, ikki vóru í lagi.

Byggifelagið Articon hevði givið móru og annað av botninum og siglt tilfarið longur út á fjørðin og sokkið tað har. Men byggifelagið ella landsverkfrøðingurin, sum er byggiharri, høvdu gloymt, at ein umhvørivskunngerð er á økinum, sum skal fylgjast.

- Loyvini skulu vera í lagi og tað er byggifelagið, sum skal syrgja fyri at loyvini eru í lagi, sigur Kristian Rasmussen frá Landsverkfrøðinginum.

### Melda til fútan

Heilsufrøðiliga Starvsstovan umsitur umhvørvisøkið og noyddist í farnu viku at steðga dýpingini. Nú er umsókn komin frá Landsverkfrøðinginum um loyvi at aftursøkkja tilfarið, men spurningurin er um arbeiðið higartil hevur verið lógligt.

- Vit mugu biðja fútan hyggja eftir hesum málinum, tí tað sær út, sum kunngerðin er brotin, sigur Suni Petersen av umhvørvisdeildini á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

Samferðsluhavnin á Trongisvági skal vera liðug hálvan november og Kristian Rasmussen frá Landsverkfrøðinginum væntar at arbeiðið verður liðugt.

- Vit halda okkum til avtalurnar við byggifelagið. Standast seinkingar av, at øll loyvi ikki eru í lagi, so kann koma upp á tal við dagbótum, men enn sær ikki út til at talan verður um seinkingar, sigur Kristian Rasmussen.